# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

## KAPPING 2019

## HVAT KANN MAN GERA FYRI AT MINKA UM TALIÐ Á SKÓGARMOTTUM Í FØROYUM?



Granskarar:  Gentur úr 8. flokki

# INNGANGUR

Vit eru sjey gentur í 8.flokki frá Skúlanum á Argjahamri. Í hesari verkætlanini hava vit arbeitt við skógargmottum, og hvussu hon ávirkar umhvørvið. Vit hava funnið okkum undrunarspurningin: “Hvat kann man gera fyri at minka um talið á skógmottum í Føroyum.”

Fyri at fáa svar á okkara spurningum hava vit hava tosað við lívfrøðingin Jens Kjeld Jensen, Leivur Janus Hansen og lurtað eftir einari samrøðu við Dánjal Samuelsen, ið bleiv bitin og fekk borelia.

Vit hava eisini tosað við djóralæknastovuna.

Eisini hava vit gjørt eina kanning, har vit spurdu tað almenna nakrar spurningar, ið relaterast til skógmottum.


Lærari:

Mariann Poulsen

Mariann.susana.poulsen@skulin.fo

Sara Leonard Dydvad

Sara.leonhard.dydvad@skulin.fo

Luttakarar: Silja, Iðunn, Halla, Bertha, Maria, Joenna og Bjørg


Vit lova, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo og,
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring.

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggja eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

## 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hvat kunnu vit gera fyri at minka um talið á skógmottum?



## 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Í øllum tí vit flyta inn, er tað sannlíkt at okkurt fylgir við. Okkara hypotesa til, hví skógarmottur eru komnar, og hví tað er so ringt at fáa tær úr aftur landinum, er, tí at vit hava innflutt ov nógv av grasi, hoyggi, plantum, djórum og líknandi.

Jens Kjeld segði, at hann helt einasta loysnin var, at stegða at flyta so nógv inn og byrjað at dyrka okkara egna.



# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Fyrsta dagin lósu vit um alt, vit kundi finna um skógarmottur og tosaðu um okkara ætlan til allar dagarnar. Vit skrivaðu eisini allar undranarspurningarnar, sum vit kundi koma í tankar um, og nógvar eyka spurningar afturat.






Næsta dagin tosaðu vit við lívfrøðingarnar Leivur Janus Hansen og Jens Kjeld, eisini snakkaðu vit við djóralæknastovuna. Síðani lurtaðu vit eftir samrøðuni hjá KVF um Dánjal Samuelsen, ið sjálvur hevur upplivað at blíva bitin og hevur fingið Borrelia av skóargmottum.

Triðja dagin gjørdu vit tvær spurnarkanningar. Vit góvu næmingum frá 4-9 flokki frá Skúlanum á Argjahamri eitt skjal fyri at kanna um øll vita, hvat skógmottir er, og hvat ein skal gera,
um man verður bitin. Eisini fóru vit í miðbýin fyri at spyrja vaksin somu spurningar og vita, hvat tey svara.


Kyn: genta drongur

Flokkur:

Veist tú hvat skovflåt er: Ja Nei

Veist tú hvat tú skalt gera um tú fart skovflåt: Ja Nei

Kunnu tey vera vandamikil Ja eg veit ikki Nei

um ja hví:

Eru tey í Føroyum: Ja eg veit ikki Nei

Fjóðra dagin byrjaðu vit at skriva rapportina.
Fimta dagin hava vit skrivað hana lidna og rættað.

## 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Vit hava gjørt eitt spurnarkanning til 4-9 flokk, har vit spurdu um fólk vita, hvat skógarmotta er:







So hava vit eisini verið í sms og spurt vaksin, um tey vita og vita, um vaksin vita betur enn børn.



Vit funnu útav, at børn og vaksin vita sirka líka nógv.

Tey vaksnu høvdu nógv svør uppá, hvat man kann gera, um man fær skógarmottur:

- Koyra sukur á
- Koyra smør á
- Fara til lækna
- Snúra hana úr
- Ikki hála hana úr
- Fáa hana vekk skjóttast møguligt
- Hála hana úr við eini pinsett
- Um tú dugir, tak tað so úr sjálvur
- Pilka hana úr
- Sproyta spritt á
- Tak ein vattpin og snúra hann runt
- Keypa okkurt serligt ting at kroysta hana úr við
- Kroyst hana úr
- Vaska hana úr

98%av bitinum hjá skógarmottum eru ósmittulig. Tó er tað stór sannlíkindi fyri, at ein verður sjúku, um skógarmottan hevur sitið í24 tímar ella meir. Um ein er blivin smittaður, kemur eitt reytt merki r undan um bitið. Tað vísir seg ikki fyri enn tvær
til fýra vikur seinni. Ein følir ikki um ein er blivin bitin,
men ein sær ein svartan blett. Tá setir ein seg í samband við ein lækna skjótast til ber. Læknin skriv ar síðani eina ávísing uppá heilivág, og síðani fer persónurin í viðgerð.

Um høvdið ella kjálkin verður sitandi, skal ein ikki fáast við tað.

Skógarmotta er eitt litið smákykt, ið oftast setur seg heit og fuktig støð á mannakroppinum. Tey seta seg t.d. undir ørmunum og millum beinini,
men kunnu eisni seta seg alla aðra staðni. Tey seta seg at súgva blóð, síðani byrjar man
at síggja ein svartan blett á kroppinum.

Har eru trý stigav borelia. Fyrsta stigið er tað minst farliga, tá er kjansur fyri at
man fær febur og verður forkølaður. Annað stig er tað kjansur fyri at
man verður lammaður. Triðja stig, tað mest vandamikla, tá er kjansur fyri at koma
at liggja fyri deyðanum. Hetta hendur bara um skógamottan berur borrelia. Um evnini frá eini skóga rmottu og fuglalús koma í kontakt, er stórur kjansur fyri at tú fært borrelia.
Skógarmottur seta seg meira á hjørtar og revar, enn tey seta seg á menniskju og onnur djór.
Skógarmottur súgva eisini blóð hjá rottum og músum, síðani koma tey á menniskuni. Vit tola ikki r ottugift, tað vil siga, at vit kunnu doyggja skjótari. Men fólk verða sjáldan smittað.
Fólk blanda ofta Teka og Skógarmottur tí tey líkast so nógv.
Men um tu telur beini kennur tú mun. Skógarmottur hava 8 bein,
og líkist einum lítlum eiturkoppi, meðan Teka hevur 6 bein og líkist ein klukku.
Tað tekur 16-17 dagar hjá einum skógarmottu at blíva vaksin. Hon hevur trý útviklingar punkt,
fyrst larva, síðani húðskifti, 10 dagar seinni er hon vaksin.
Tað eru umleið 20 sløg av blóðmottum, men
har eru bara funnin trý í Føroyum. tey eru lundalús, fuglalús og skógamotta. Skógarmotta er tað ken dasta slagið í norðurlondunum.
Skógarmottan klárar at økja sina vegt meira enn 100 ferð, aftaná hon hevur sogið blóð.
Um høvdið ella kjálkin á djórinum verður sitandi skal
man ikki fáast við tað. Kroppurin ger tað sjávur innafyri nakrar dagar, tað henda sum
vanligt ikki nøkur fløkja.

Í endanum av juni 2015 luttók William Simonsen, lívfrøðingur vegna Landssjúkrahúsið og Syddansk Universitet, Janus Hansen, fyri Føroya Náttúrugripasavn/Søvn Landsins og teir tríggir; Dr. Jolyon Medlock, Kayleigh Hansford og Alexander G.C. Vaux, granskarar frá British Health, í eini landsumfatandi leiting eftir skógarmottum í Føroyum.
Leitað varð í ymiskum støðum kring landið, ið vórðu mett at vera gott lendi til skógarmottur,
til dømis í viðarlundum.

Tá leitað bleiv blivu tvær funnar í Suðuroynni. Hetta var fyrstu ferð,
at skógarmottur vóru funnar við at leita systematiskt eftir teimum í náttúruni í Føroyum. Tað, ið var ð funnið áðrenn, var mest
á hundum og kettum, umframt hendingaferð á fólki. Vísindalig grein um innsavningina og arbeiðið í 2015 frá teim luttakandi er nú á veg, og er tað Dr. Jolyon Medlock sum

er høvuðsrithøvundur. Áhugin fyri útbreiðsluni av skógarmottuni er vaksandi, og William Simonsen, biologur og
Shahin Gaini, lækni og smittuserfrøðingur hava í samstarvi við øðrum norðurlendskum granskarum nú byrjað eina granskingarætlan,
sum serliga fokuserar á harur. Kanningarnar skulu eftir ætlan vísa, um skógarmotta er
á teimum. Hetta verður best kannað við blóðroynd, tí hevur ein hara havt skógarmottu, so
er hon helst bitin av hesari, og
so sæst tað í blóðinum á haruni. Serlig andevnir verða dannað í blóðinum, og soleiðis ber til
at staðfesta, um harurnar er fengdar við blóðmottu.

Í harutíðini síðsta ár vórðu fyrstu leitingarnar gjørdar og vístu at skógarmottan fanst í Suðuroynni, hvat var so meira passandi enn at fáa í lag samstarv við sera vælskipaðu klappjaktina í Trongisvági, sum í ár hevur heili 124 ár á baki. Í ár fingu skjúttarnir á Klappjaktini 50 harur, og 50 gløs og 50 sproytur blivu so sendar suður, og tá harurnar hava hingið 2-4 dagar, og eru klárar at slakta, fara menn so, hvør í sínum lagi at taka blóðroyndirnar, og hesar verða síðani handaðar einum kontaktpersóni, sum sendir allar 50 blóðroyndirnar til Havnar, har víðari kanningin verður framd. William Simonsen, biologur og ein av stigtakarunum sigur seg vera spentan um, hvat úrslitið fer at vísa. - Vit vænta ikki at síggja tað stóra, men eru tað dømir um blóðmottu, so er tað avgjørt sera áhugavert, sigur William Simonsen. Biologurin sigur víðari, at blóðmotta kundi væl verið á seyði til dømis, men at tær høvdu doyð av sápuni sum seyðurin verður vaskaður við.

Vit hava tosa við Jens Kjeld, Leivur Janus Hansen og Djóralæknastovuna. Vit hava spurt tey hesar spurningar:

**Hvat kann man gera fyri at minka um skógarmottur í Føroyum?**

**Jens Kjeld:**

Nógvar skógarmottur koma við til Føroyar, tá skip koma við grasi og hoyggi. Tey eru sum oftast í grasinum og hoygginum. Hann sigur, um vit ikki høvdu flutt so nógv gras og hoyggj inn til Føroyar, so hevði talið av Skógarmottum kanska minkað.

**Leivur Janus Hansen:**

Áðrenn vit kunnu gera nakað fyri at minka um talið í Føroyum, eru vit noyd til at finna útav, hvussu tær liva. Vit mugu m.a. vita hvørjum djórum og hvørjum lendi tey liva í. Um tey eru á harum, kunnu vit gera so, at harurnar ikki koma har, sum skógarmotturnar eru. Um man ger tað, missa skógarmotturnar ein týdningarmiklan part av síni lívsringrás.

**Djóralæknastovan:**

Tey flestu koma við hundum, kettum og øðrum djórum. Um øll djór verða viðfarin ordiligt og vera kannaði, áðrenn tey koma til Føroyar, kann tað minka um talið á Skógarmottum.

**Hvar í Føroyum liva tær?**

**Jens Kjeld:**

Tær eru mest í Vestmanna og Tórshavn, men eru eisini Vágoy, Streymoy, Suðuroy, Nólsoy, Eysturoy, Borðoy, Kalsoy, Rituvík, Sørvági, Runavík, Froba, Argir og Velbastað.

**Leivur Janus Hansen:**

Í Føroyum seta tey seg á grasstrá og bíða eftir, at onkur gongur framvið, og síðani fara tey frá grasstráðnum og á tann, ið gongur framvið. Tær kunnu ikki sita á einum grasstráði allatíð, so tær fara niður á vøllin og goyma seg í bløðunum. Skógarmottur eru funnar í vøkstri í Klaksvík og á Tvøroyri.

**Hvussu komu tær til Føroyar?**

Øll meintu, at har var einki heilt sikkurt svar, men man heldur, at tey eru komin við djórum, grasi og hoyggi, sum er innflutt til Føroyar.

**Er tað stórur møguleiki at fáa Borrelia?**

**Jens Kjeld:**

Nei tað er ikki stórur møguleiki at fáa tað í Føroyum. Har eru 5 sløg av Borrelia. Í Føroyum hava vit eitt slag, sum ikki er líka farligt sum onnur, hetta slagið ger, so at man verður forkølaður og kanska fær febur. Eitt av hinum sløgunum kann man bliva sjúkur, lammaður og man kann doyggja. Vit hava tó nøkur fá av teimum meira farligu í Føroyum. Fólk eru blivin ræðuliga sjúk, og hava ligið fyri deyðanum.

**Leivur Janus Hansen:**

Veit ikki, um tað er stórur møguleiki.

**Djóralæknastovan:**

Nei har er ikki stórur møguleiki, men har er ein møguleiki.

**Eru nakrir fyrimunir við Skógarmottum?**

Øll meintu, at eingin fyrimunir var við teimum.

Vit hava eisini lurtað eftir sendingini á KVF.fo, har Dánjal Samuelsen sigur frá, hvat hansara uppliving var, tá ið hann bleiv bitin.

Hann bleiv bitin og bleiv lammaður í høgru síðu á andlitinum, hann meinti, at hann ikki var so álvasliga lammaður, sum onnur eru blivin.

Tað bleiv staðfest í desembur 2018, at hann hevði Borrelia. Hetta slagið av Borrelia var ókent í Føroyum. Hann bleiv knappliga lammaður, sjúkan var ikki smittilig. Hann tók heilivág, men tað hjápti ikki nógv. Hann fekk at vita, at sjúkan bara skuldi vara í eitt ár, hann var heppin, tí hjá øðrum kann tað enda við, at tað ikki fer burtur.

Talið á Skógarmottum veksur allatið í Føroyum. Um man blívur bitin, skal man fáa hana vekk skjóttast møguligt. Tað tekur umleið eitt døgn hjá Skógarmottuni at spreiða seg, Dánjal fann tó ikki útav, at hann varð bitin fyrr enn tvær vikur seinni, tá var tað farið út í kroppin, og hann fann útav, at hann hevði fingið Borrelia.

## 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

**Vit eru komin fram til at man kann minka talið, um øll djór, gras, hoyggj og plantur vera kannaði áðrenn tað verður sent avstað.**

## 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit hava lagt tað fram fyri flokkinum og uppgávan er tøk á www.gransking.fo

## FYLGISKJØL